UTTAN ÚR HEIMI

# Norðurkorea slakar

**Norðurkoreanska stjórnin er nú sinnað at sleppa sínum kjarnorkuvápnum, um Suðurkorea ger tað sama.**

KJARNORKUVÁPN

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Í gjár hittust umboð fyri Norðurkorea, Suðurkorea, USA, Kina, Russland og Japan enn eina ferð at tingast um ta norðurkoreonsku kjarnorkuverkætlanina. Byrjanin vísti, at hesaferð eru vónir um, at nakað munagott fer at spyrjast burturúr.

- Eftir okkara tykki er tað týdningarmikið, at vit kunnu taka samráðingarnar uppaftur, men tað týdningarmesta er, at vit kunnu fáa nakað burturúr, so Koreanesið verður eitt kjarnorkuvápnafrítt øki. Sleppur Suðurkorea sínum kjarnorkuætlanum, eru vit til reiðar at gera tað sama, segði norðurkoreanski samráðingarleiðarin Kim Kye-Gwam, tá tann fyrsti fundurin í Beijing byrjaði. Hann legði afturat, at vísa allir partar samarbeiðsvilja, ber tað til at røkka málinum.

Christopher Hill, sum stendur á odda fyri amerikonsku samráðingarnevndini, segði mánadagin, at USA hevur ongar ætlanir um at leypa á Norðurkorea, sjálvt um George W. Bush, forseti, fyrr hevur sett landið í bás sum eitt av teimum óndsinnaðu londunum. Christopher Hill segði, at USA viðurkennir norðurkoreanska sjálvræðið og er sinnað at tingast við landið um trygdarviðurskiftini við tí fyri eyga at beina øll kjarnorkuvápn burtur.

- Kjarnorkuvápn fara ikki at gera Norðurkorea tryggari. Tvørturímóti fara tey bara at økja spenningin í økinum og at hótta altjóða avdubbingina, segði amerikanski samráðingarleiðarin.



*Samráðingarleiðararnir Christopher Hill og Kim Kye-Gwam høvdu góðar vónir um, at okkurt fer at spyrjast burtur úr samráðingunum hesaferð.*

## Norðoya Sambandsfelag ynskir JFK góðan byrð



**John William Joensen, form.**

Norðoya Sambandsfelag metir tað vera ein sigur fyri Norðoyggjar, at lokalar kreftir, eisini í samband við keypið av JFK frá Føroyagrunninum, stóðu saman og framdu eina djarva verkætlan, sum framvegis kemur at tryggja nøkur av størstu virðunum í høvuðsvinnu okkara rótfesti í N orðoyggjum.

JFK hevur altíð verið stoltleikin hjá norðoyingum og ti fegnast vit um at JFK nú umsíður, aftur er á privatum hondum, sum hava sínar røtur í lokalsamfelagnum.

# Ísraelskir hermenn sýta fyri at gera eftir boðum

**Trýstið á teir ísraelsku hermenninar veksur, so hvørt sum afturtøkan úr Gaza nærkast. Summir hermenn sýta fyri at gera eftir boðum frá leiðsluni.**

ÍSRAEL

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Sum tann fyrsti er heryvirmaðurin Boris Albert stevndur fyri ein hernaðardómstól, tí hann hevur sýtt fyri at flyta jødisk niðursetufólk úr Gaza-geiranum. Vewrður hann funnin sekur, kann hann fáa upp í fýra ára fongsul.

Eygleiðarar í Ísrael siga, at rættarmálið ímóti Boris Albert hevur til endamáls at ræða aðrar hermenn fyri at fáa teir at akta boðini frá herleiðsluni. Higartil hava umleið 80 hermenn sýtt fyri at noyða niðursetufólkini úr Gaza-geiranum, men sambært Reuters ber herleiðslan ótta fyri, at nógv fleiri hermenn fara at gera tað sama, tá flytingin úr Gaza byrjar tann 15. august.

Hermenninir eru undir stórum trýsti. Víðgongdir rabbinarar prædika, at Guð hevur givið jødiska fólkinum Gaza, og at jødiskir hermenn eiga ikki at reka aðrar jødar frá húsi og heimi. Tað vóru helst hesi boðini, sum seinasta vikuskiftið fingu tólv hermenn at seta seg up ímóti teirra yvirmanni. Reuters skrivar, at tað eydnaðist yvirmanninum at fáa tríggjar teirra at broyta hugsan. Sjey vórðu tiknir, og tað eydnaðist tveimum at flýggja til niðursetubygdina Neve Dekalim, har teir vórðu móttiknir sum hetjur.

Ísraelski verjuovastin, Dan Halutz, kunngjørdi mánadagin, at tað áliggur øllum hermonnum at lýða boðini frá yvirmonnunum, og at teir, sum seta seg upp ímóti boðunum, verða revsaðir. Reuters skrivar, at tað er ikki av tilvild, at kunngerðin hjá herovastanum kemur júst nú, tí spenningurin ímillum teir 40.000 hermenninar, sum skulu fáa niðursetufólkini úr Gaza, er stórur.

## Aftur í hernað ímóti kríggi

Fyri meiri enn 30 árum síðani var amerikanska filmskvinnan Jane Fonda ímillum teirra, sum vildu hava teir amerikonsku hermenninar úr Vietnam. Nú roynir hon aftur, og hesaferð er málið at fáa teir amerikonsku hermenninar heim úr Irak.

Mánadagin kunngjørdi hon, at hon hevur gjørt av at fara ein túr um alt USA við einum bussi. Hon verður ikki einsamøll á ferðini, tí í bussinum verða eisini skyldfólk hjá hermonnum, sum eru í Irak, og skyldfólk hjá hermonnum, sum eru falnir í krígnum har.

Nógvir amerikanarar tóku undir við Jane Fonda, tá hon vildi hava hermenninar úr Vietnam, men mong vendu sær ímóti henni, tá hon í 1972 fór til Norðurvietnam og lat seg avmynda undir liðini á einari loftverjukanón. Tað hevur hon seinni biðið um umbering fyri, og hon sigur, at hesaferð ætlar hon sær at brúka royndirnar frá stríðnum ímóti Vietnamkrígnum.

## Nógv verd feløg

Tann góði oljuprísurin ger, at tey bæði stóru norsku oljufeløgini, Statoil og Norsk Hydro, eru vorðin nógvar pengar verd, og at virðið veksur í hvørjum.

Altjóða fíggjarstovnurin Lehman Brothers sigur í einari nýggjari meting, at partabrøvini í Statoil og Norsk Hydro fara at veksa munandi í virði tey næstu árini, og at tey longu nú eru meiri verd, enn skrásetingin á virðisbrævamarknaðinum í Oslo vísir. Aftenposten skrivar, at er metingin hjá stovninum røtt, er virðið á partabrøvunum í Statoil 357 milliardir norskar krónur, meðan partabrøvini í Norsk Hydro eru 186 milliardir krónur verd.

Tað merkir, at tey bæði feløgini eru 543 milliardir norskar krónur verd. Til sammetingar kann nevnast, at á virðisbrævamarknaðinum í Oslo er virðið á teimum báðum feløgunum í løtuni 470 milliardir norskar krónur.

## Saddam skal til Svøríkis

Fær verjin hjá fyrrverandi irakska einaræðisharranum Saddam Hussein sín vilja, skal Saddam fyri rættin í Svøríki. Svenska løgmálaráðið kunngjørdi annars mánadagin, at tað hevur sýtt fyri at lata Saddam koma fyri rættin har, men at stjórnin er sinnað at taka málið uppaftur, um ein áheitan kemur frá ST.

Tað hevur verjin, Giovanni di Stefano, tikið til eftirtektar, og tí hevur hann nú gjørt av at biðja ST senda stjórnini í Stockholm eina áheitan um at lata Saddam Hussein koma fyri rættin í Stockholm. Irakska stjórnin hevur kravt, at fyrrverandi einaræðisharrin kemur fyri rættin í heimlandinum, men Giovanni di Stefano og hinir 19 verjarnir halda uppá, at trygdarviðurskiftini í Irak eru ikki nóg góð.

Sum skilst vil Saddam sjálvur fegin sleppa fyri rættin í Svøríki, og hann er ikki tann einasti. Varaforsætisráðharri hansara, Tariq Aziz, hevur sagt, at hann vil fegin sleppa fyri rættin í Svøríki ella í Niðurlondum. Tað er ikki greitt, hvat irakska stjórnin heldur um tað hugskotið.

## Sjáldsamur fiskur

Tríggir norskir smádreingir gjørdust ikki sørt ovfarnir, tá teir nú um dagarnar fingu ein løgnan fisk í einum garni. Tað vísti seg at vera ein St. Pætursfiskur.

Fiskifrøðingurin Audun Hjertager sigur við Dagsavisen, at hetta fiskaslagið heldur til í Miðjarhavinum og í Atlantshavinum, men at vanliga kemur tað ikki norður um Ermasund. Kortini er fiskurin fingin fleiri ferðir í norskum sjógvi tey seinastui árini, og fiskifrøðingurin ivast ikki í, at hetta kemst av, at sjógvurin er vorðin heitari enn fyrr. Eitt nú er sjógvurin í Norðsjónum meiri enn eitt hálvt stig heitari nú enn fyri góðum 20 árum síðani, sigur hann.

Audun Hjertager sigur, at tey seinastu árini hava fiskifrøðingarnir fingið fleiri fyrispurningar um sjáldsamar fiskar, sum fólk ikki kennast við. Tað er serliga um summarið, tí tá er sjógvurin heitur, og tað fer fremmand fiskasløg at leita sær norður á okkara leiðir, sigur hann.